## Casillas er tann besti

Mikukvøldið spæla Liverpool og Real Madrid í Champions League. Tveir av fremstu sponsku málmonnunum verja málini hjá feløgunum. Og sambært Liverpool-málmanninum er tann hjá Real Madrid heimsins besti. - Hóast tað ikki er stórur munur millum teir bestu málmenninar, so haldi eg, at Casillas er heimsins besti málmaður í løtuni, sigur Pepe Reina við spanska blaðið AS.



## Bentley privatar trupulleikar

Tað hevur ikki verið meira enn næstbest hjá David Bentley, sum Tottenham í summar keypti fyri heili 150 milliónir úr Blackburn. Og Bentley sjálvur viðurkennir síni misjøvnu avrik. - Eg havi havt truplt at savna meg um fótbóltin. Tað hevur verið nógvur ófriður í felagnum og í tí privata hjá mær. Men nú eri eg komin burturúr tí, og eg eri til reiðar at stríðast fyri mínum plássi á liðnum, sigur David Bentley við Sport Life.

## Einki bar til hjá okkum

Ein av royndastu spælarunum hjá Stjørnuni, Una Olsen, mátti eftir dystin ímóti VB í Vági viðganga, at einki vildi bera til hesa ferð. Hon viðurkennir, at Stjørnan mátti lúta fyri einum betri liði.

– Tær spældu nógv betri enn vit, umframt at Asta í málinum hjá teimum stóð sum ein múrur fyri okkum, tá vit fingu teir stóru kjansirnar. Og tað fingu vit rættiliga ofta, uttan tó at fáa so nógv burturúr, sigur Una, sum helt dystin vera merktan av, at ferðin á spælinum ikki var serliga høg.

– Vit tosaðu um tað í hálvleikinum og hvørja ferð vit tóku »timeout«, at vit máttu fáa meira ferð á spælið hjá okkum, men tað hendi bara ikki. Eingin av okkum megnaði at spæla upp til sítt besta og allar brendu.

Una sigur, at hóast Stjørnan viðhvørt fekk verjuspælið at rigga nøkulunda, so eydnaðist allíkavæl ongantíð at koma ongantíð í nánd av VB, sum hon væl dugir at síggja sum ein avbjóðara til oddasessin.

– Nú mugu vit taka okkum saman, so vit ikki lorka alt burtur. Vit fóru til Vágs og vóru fimm stig frammanfyri. Høvdu vit vunnið, var munurin sjey stig, men nú minkaði hann niður í trý stig. Hetta var av hundanum til, staðfestir strikuspælarin hjá Stjørnuni.

**hil**

VB-Stjørnan 30-22 (17-12):

# Nú fer VB eftir oddasessinum

**Við greiða sigrinum í Vági settu kvinnurnar hjá VB eina tjúkka striku undir, at tær ikki bara ætla sær í FM-finaluna, men at gera tað sum vinnari av Sunset-kappingini. VB var alla tíðina betra liðið í einum dysti, har Stjørnan ongantíð slapp í gongd**



*Kvinnurnar hjá VB gjørdu bart sunnudagin og sendu Stjørnuna norður aftur um Suðuroyarfjørð við einum greiðum tapi. VB vann við átta málum og bjóðar nú av álvara av í kappingini um oddasessin*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Aftur í ár hevur Sunset-kappingin verið ein spurningur um Stjørnuna og so hini. Men nú skelvir grundin undir liðnum úr Klaksvík, sum bara er trý stig framman fyri VB. Framvegis eru fýra umfør eftir, so nógv kann henda í kappingini, áðrenn greitt er, hvørji tvey av teimum fýra fremstu liðunum enda í finaluni, har vinnarin fer við øllum.

Sunnudagin sást frá byrjan, at vertirnir í Vági høvdu alt at spæla fyri, tá VB og Stjørnan komu á vøllin. VB mátti og skuldi vinna, meðan Stjørnan kanska var eitt sindur léttari í hugburðinum, tí liðið undan dystinum jú var fimm stig fremri.

Men beinanvegin setti VB seg á dystin og koyrdi á Stjørnuna, ið hevði ilt við at fóta sær. Tá so Stjørnan royndi, var VB-verjan stinn, og serliga gjørdi Asta Armonavicute í málinum tað torført hjá Stjørnuni at fáa bóltarnar í kassan.

### Átta mál á strikuni

Ferðin á spælinum var ikki tann nógva, og tað var minst líka nógv Stjørnan, ið gjørdi seint av. Lítið sást til skjóta kontraspælið, ið plagar at vera vørumerkið hjá Stjørnuni, meðan kvinnurnar VB hinvegin vóru óførar at koma aftur í verjustøðu, so skjótt sum eitt álop var av.

Í fyrra hálvleiki var tað blaðunga Bára K. Mortensen á strikuni hjá VB, ið var størsta plágan hjá Stjørnuni. Heilar átta ferðir fekk hon sett bóltin í netið, og væl lá fyri hjá henni at brúka tær monguog góðu fríspælingar, hon fekk frá fyrst og fremst Daivu Toumaite og Gurið Mortensen.

Hetta hóvaði ikki Stjørnuni, ið ansaði so mikið væl eftir Báru í seinna hálvleiki, at hon einki mál fekk aftrat. Men í staðin gjørdust tað aðrar, ið gjørdu sær dælt, so VB allan dystin á tamb helt fast í leiðsluni, ið ongantíð var minni enn fýra mál.

Ta einu løtuna í seinna hálvleiki ørkymlaði tað VB eitt sindur, at Stjørnan partvíst dekkaði 5-1 og partvíst valdi at taka annaðhvørt Daivu og Gurið ella Daivu og Aukse Vyskniaskaite úr spælinum við mansverjum. Men VB fótaði sær skjótt aftur og helt fram við at stýra dystinum.

### Hóttur oddasessur

Miðskeiðis í seinna hálvleiki hevði Stjørnan eina hampuliga løtu, har tað eydnaðist at nærkast VB eitt sindur, men tað gekk bara í eina løtu. Aftur her vóru tað verjan og málverjin hjá VB, sum trektu tennirnar úr Stjørnuni, ið sjálvt ikki fekk brúkt sínar størstu kjansir til fulnar.

Og ímóti endanum, tá tað fyrr í vetur hevur staðið hjá VB at halda fast, gjørdist tað í staðin til ein sannførandi trumf, ið VB-kvinnurnar kundu seta á dystin. Síðstu fimm minuttirnar skoraði VB fimm ferðir og Stjørnan eina ferð, og so var sannførandi sigurin við átta málum á muni ein veruleiki.

Sostatt fekk VB hálað seg enn nærri oddasessinum, sum nú er bara trý stig burturi, samstundis sum átta stig eru eftir at spæla um. Í sínum lagi má Stjørnan spakuliga ansa sær, skal tann annars so tryggi oddasessurin ikki søplast burtur.

### FAKTA um dystin

**VB-Stjørnan 30-22 (17-12)**
10 min: 8-4
20 min: 13-8
30 min: 17-12
40 min: 20-15
50 min: 24-20
**Málskjúttar:** VB: Daiva Toumaite 9, Bára K. Mortensen 8, Svava Vestergaard 5, Aukse Vyskniaskaite 4, Rannvá Johannessen 2, Gurið Mortensen 1, Monika Samuelsen 1
**Stjørnan:** Durita Ljósstein 7, Simona Petersen 4, Durita Christophersen 3, Bára S. Klakstein 3, Diane Møller 2, Una Olsen 2, Durita Mikkelsen 1
**Brotskøst:** VB 3, Stjørnan 6
**Útvísingar:** VB 4, Stjørnan 3
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

# Vit vilja enda í Vági

– Nú trúgva vit ordiliga upp á tað og fara eftir oddasessinum. Vit ætla okkum ikki bara í finaluna, men vit ætla okkum í hana sum oddalið, so vit kunnu enda við avgerandi FM-finaluni í Vági, sigur Bára K. Mortensen, sum royndist sera væl á strikuni hjá VB ímóti Stjørnuni sunnudagin.

Hon skjeyt átta mál í dystinum, og tey fekk hon øll í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki ansaði Stjørnan betri eftir henni, umframt at hon tá fleiri ferðir mátti fara av strikuni, tí Stjørnan broytti verjuspælið. Men tað pilkaði ikki smílið av henni, tá dysturin var liðugur:

– Tað var ótrúliga stuttligt í fyrra hálvleiki, tá eg eisini fekk nógvar góðar bóltar frá Daivu og Gurið. Vit hava vant hetta nokk so nógv, og tí er tað serliga stuttligt, tá tað eisini fæst at rigga í dysti, sigur Bára, sum serliga helt byrjanina á dystinum hava týdning fyri endaliga úrslitið.

– At vit komu so væl í gongd og beinanvegin fingu eina góða leiðslu, hevði nógv at siga fyri okkum. Og so var tað eisini ótrúliga deiligt, at vit ikki fóru niður við nakkanum ímóti endanum, men hildu á við at stríðast. Um nú Neistin og Tjaldur hjálpa okkum við at basa Stjørnuni, kunnu vit saktans røkka upp á fremsta plássið.

**hil**